## Besta fløga á AME

Umframt heiðurin og snotiligu planetina sleppur vinnarin av planetini fyri bestu fløgu á Planet Awards á pallin á AME tiltakinum, ið Norðurlandahúsið skipar fyri.

Hetta er ein stórur møguleiki hjá Planetvinnaranum, ið sostatt sleppur at framføra fyri nógvu innbodnu gestunum úr tónleikaídnaðinum.

Fyri at atkvøða um hvør skal vinna planetina, kanst tú senda eini sms boð til 1930, við koduni, ið stendur aftan fyri tað navnið, ið tú vilt atkvøða fyri. Hvørt sms kostar 5 kr, og tú hevur loyvi at atkvøða einaferð fyri hvørja planet. Øll føroysk fartelefonhald kunnu atkvøða:

Planet Awards verður 27. januar tilnevningarnar til planetina fyri bestu útgávu eru hesar:

Gestir – Burtur frá Toftunum pla bu 1, Makrel – Transcend pla bu 2, The Dreams – Tazy pla bu 3, Teitur – Stay Under The Stars pla bu 4, Týr – Ragnarok pla bu 5

**nud**

# fáa



*- Útlinini fyri 2007 eru góð, sigur Asbjørn Djurhuus, útgerðarmaður hjá Norðsøka*



*Nógv arbeiði er á Batafiski. Tey seks arbeiðsfólkini hava úr at gera*



*Norðsøki er elsti línubáturin í landinum – bygdur í 1942 úr eik í Holbæk. Enn roynist hann væl*

frá landi aftur hetta kvøldið og á sama stað.

Men veðurmenninir boðaðu hinvegin frá nógvum vindi um kvøldið, so henda útróðrarferðin varð av ongum.

- Nú er hann vorðin so mikið vestligur í ættini, at tað verður trupult at fara avstað, sigur Asbjørn.

Norðsøki avreiddi annars 12.000 pund hósdagin, og fríggjamorgunin løgdu teir 9000 pund upp á land til Bátafisk á Eiði.

### Hjálpir uppá prísin

Norðsøki varð í síni tíð smíðaður úr eik í Holbæk í Danmark. Tær skiftandi manningarnar umborð á bátinum vita tí alt um ójavnar fiskitíðir.

Í seinastuni hevur tó verið nógv at fingið – serliga av hýsu. Haraftrat hava teir fingið væl fyri veiðuna.

- Jú, teir hava fiskað væl, og tá fiskaprísurin er í toppi, so skuldi borið væl til.

- Teir hava fingið upp í 18-19 kr. fyri kilo. Slíkt er óhoyrt, sigur Asbjørn.

Eitt er nøgdin av hýsu, eitt annað prísurin. Eitt heilt triðja er, hvussu hýsan er fyri.

Sambært Asbjørn er hon væl fyri, - so væl, sum hann sjáldan hevur sæð áður.

Fyrr var ofta tosað um hýsu 3. Í dag er alt eftir vekt, so støddin nú er at meta sum hýsa 2.

- Tað hjálpir eisini væl uppá prísin, sigur hann.

# 2900 tons í fjør

**Tá teir byrjaðu at taka ímóti fiski á Bátafiski fyri nøkrum árum síðani var trupult, fyri ikki at siga ógjørligt at fáa nakað fyri hýsuna í heila taki.**
**Í dag er støðan munandi broytt, nú menn fáa heilt upp í 19 krónur fyri kilo.**

**VIRKI**
*Snorri Brend*

**Eiði:** Aftanfyri Bátafisk eru fimm smábátar sum eiga 1/3 í virkinum, útróðrarbátarnir Norðsøki og Hvíthamar eiga 1/3, meðan tann seinasti triðingurin er á landi, Rainbow sum selur fyri bátarnar.

Bátafisk varð stovnað fyri at taka ímóti útróðrarfiski. Í seinastuni hevur tó verið meiri at fingið av hýsuni, og við tí góða fiskaprísinum er einki sum bendir á at menn fara at gevast at veiða hetta fiskaslagið.

Í fjør tók virkið ímóti 2900 tonsum, og var tað heldur meiri enn árið fyri.

- Eg haldi ikki at tað sær so galið út fyri 2007.

- Enn er várið ikki komið, og vit fara nokk at síggja meiri til toskin, sigur Asbjørn Djurhuus, sum er nevndarformaður í Bátafiski.